# VÍF og Maersk hava gjørt stuðulsavtalu

**Danska flogfelagið tykist av álvara at spíla seg út á føroyska marknaðinum**

STUÐULSAVTALA
*Jákup Mørk*

Leygardagin skrivaðu umboð fyri VÍF og Maersk undir stuðulsavtalu, sum fyribils er galdandi í eitt ár.

Hetta hendi á ferðasýningini, sum var í SMS um vikuskiftið, og sum skilst, so eru tað tveir væl nøgdir partar, sum nú hava skrivað undir sáttmála.

Hjá Maersk er hetta um nakað enn ein undirstrikan av, at felagið nú hevur átikið sær ein munandi størri og meira aktivan leiklut í slíkum samanhangi. Sostatt er avtalan við VÍF tann triðja, sum verður inngingin í ár, eftir at bæði B36 og Sumba hava gjørt sponsoravtalur við danska felagið.

Bárður Nielsen, sum umboðar VÍF í hesum sambandi, sigur um nýggja sáttmálan, at hesin er eitt sindur øðrvísi uppbygdur, enn flestu stuðulssáttmálar.

- Sum heilt má eg siga, at vit eru væl nøgdir. Í fyrsta lagi gevur hetta okkum eina samsýning, uttan at eg tó fái sagt nakað um støddini á hesi.

- Í øðrum lagi er hetta skipað soleiðis, at vit hava átikið okkum ein aktivan leiklut yvirfyri Maersk. Tað verður nevnliga soleiðis, at vit kunnu heita á okkara limir og stuðlar annars, um at tekna seg til eina sokallaða nýggjheitstænastu hjá Maersk. Umframt at hesi tá fáa ymsar upplýsingar sendandi umvegis teldupost, verða eisini tilboð av ymsum slag latin, og á tann hátt kann hetta koma bæði VÍF, limum tess og Maersk til góðar, staðfestur Bárður Nielsen.

At byrja við verður tað einamest á stevnunum, at sjónligu tekinini um nýggja sáttmálan verða at síggja.




*Maersk Air og VÍF undirskrivaðu nýggjan sponsorsáttmála seinasta leygardag*

Bárður Nielsen sigur, at í fyrsta umfari fara øll kapproðrarfólk hjá VÍF at hava eyðkendar búnar við navnamerkinum hjá sponsorinum á. Hvørt hetta eisini verður gjørt við hondbóltsleikarar og badmintonfólk er enn ikki greitt, men tann møguleikin verður so ikki útilokaður. Sáttmálin er í fyrsta umfari galdandi í eitt ár, og um báðir partar eru nøgdir til ta tíð, er væl hugsandi, at talan verður um at leingja samstarvið.




# Fótbóltur á fartelefonini

**Nú landskappingin byrjar, ber til hjá fartelefonfeløgum at tekna seg til úrslitatænastu umvegis GSM-telefonir**

SMS-TÆNASTA
*Jákup Mørk*

Landskappingin í fótbólti nærkast nú av álvara. Fyrsti dysturin skuldi eftir ætlan verið leiktur longu hóskvøldið, men hetta verður so helst flutt til fríggjadagin, sum tað framgongur aðrastaðni í blaðnum.

### Nýggj tænasta

Í londunum kring okkum hevur tað seinnu árini verið alt meira vanligt, at fólk hava teknað seg til SMS-tænastur av ymsum slag, soleiðis at fylgjast kann við, hvussu úrslitini í ymsum ítróttargreinum laga seg.

Saman við Sp/f Kervi og Sosialinum fer Føroya Tele nú eisini undir at reka slíka tænastu. Fólk við GSM haldi hjá Føroya Tele kunnu við einum SMS-boði tekna seg til tænastuna, og eftirfylgjandi fáa tey so SMS-boð sendandi, so hvørt sum ymsu dystirnir eru lidnir.

Tilmelding til nýggju tænastuna fer fram við at senda SMS-boð við tekstinum, fm til, á nummar 1441. Skal tænastan frámeldast, skulu boðini, fm fra, sendast til sama nummar.

Kostnaðurin fyri tænastuna er 10 kr. fyri hvørt umfarið í fótbóltslandskappingini, umframt at talan er um vanligan SMS takst við til- og frámeldan.



# Heilivágur ímóti krími kann kanska lekja SARS

*SARS hevur serliga gjørt um seg í Fjareystri. Hendan myndin er ú taiwanska høvuðsstaðnum Taipei*



**Kanningar hjá týskum granskarum benda á, at heilivágur, sum er ætlaður til vanligt krím, kann mótvirka herviligu lungnasjúkuni SARS**

SARS
*Árni Joensen:*

Nógv bendir nú á, at heilivágur ímóti vanligum krími er nóg mikið til at steðga teirri nógv umrøddu lungnasjúkuni SARS, sum seinastu tíðina hevur kravt fleiri mannalív.

Kanningar hjá týskum granskarum benda í hvussu er á, at ein heilivágur, sum ætlanin var at nýta ímóti vanligum krímsjúkum, kann steðga SARS, verður hann viðgjørdur eitt sindur øðrvísi enn upprunaliga ætlað.

Rolf Hugenfeld, sum er granskari á lærda háskúlanum í Lúbeck, sigur, at tey hava staðfest tað proteinið, sum SARS nýtir til at smitta kyknurnar í mannakroppinum, og hann ivast ikki í, at krímheilivágurin er eitt gott grundarlag undir royndunum at gera ein heilivág, sum skal steðga SARS.

Samstundis skriva kinesisk bløð, at nógvir kinesarar hava mist vónina um, at granskararnir fara at finna ein egnaðan heilivág ímóti SARS. Tað hevur havt við sær, at nógv fólk og serliga bøndur á bygd eru farin aftur til gamlar siðir í einari roynd at tryggja seg ímóti sjúkuni.

Higartil hevur SARS bara gjørt um seg í teimum kinesisku býunum, men ymiskt er, sum bendir á, at sjúkan er í ferð við at breiða seg út á bygd. Tað kann sambært kinesisku fjølmiðlunum fáa álvarssamar avleiðingar, tí heilsuverkið á bygd er sera vánaligt sammett við heilsuverkið í býunum.

Sambært heilsheilsustovninum WHO hava 7.400 fólk fingið SARS, og higartil eru 581 fólk deyð av sjúkuni.

# Eisini vandi fyri yvirgangi í Týsklandi

**Meiri enn 30.000 fólk eru limir í islamskum felagsskapum í Týsklandi, og summir teirra hava sum mál at skipa víðgongt islamskt stýri í Týsklandi**

YVIRGANGUR
*Árni Joensen:*

Yvirgangsfelagsskapir hótta trygdina í Týsklandi, og týsk mál uttanlands eru eisini í vanda.

Tað sigur týski innanríkisráðharrin, Otto Schilly. Hann sigur, at kríggið í Afghanistan og umfatandi løgregluarbeiði hava ikki forðað fyri, at fleiri bólkar innan al-Qaeda, Arabiskt Mujaheddin og Taliban eru framvegis virknir.

Týska løgreglan veit um fleiri hundrað víðgongdar limir í islamskum felagsskapum, og einir 200 teirra eru undir støðugum eftirliti, tí illgruni er um, at teir arbeiða við yvirgangsætlanum. So seint sum fyri einum mánað síðani tók løgreglan í Berlin ein 32 ára gamal mann úr Tunis, sum var í ferð við at útvega al-Qaeda limir í Týsklandi.

Otto Schilly, innanríkisráðharri, sigur, at 30.600 fólk í Týsklandi eru limir í islamskum felagsskapum.

- Nøkur teirra hava sum mál at seta sharia-lógir og islamskt stýri í gildi bæði í heimlandinum og í Týsklandi, sigur Otto Schilly.

Týska løgreglan sigur, at í Týsklandi eru 69 víðgongdir útlendskir felagsskapir, sum mugu metast sum ein hóttan fyri týsku trygdina. At Týskland hevur hermenn í Afghanistan hevur økt hendan vandan, sigur løgreglan.

## Skuldsettur fyri 25 morð

Fyrrverandi forsetin í Peru, Alberto Fujimori, er skuldsettur fyri at hava verið uppi í tveimum hópmorðum.

Jose Luis Lecaros, dómari, er komin til ta niðurstøðu, at fyrrverandi forsetin samskipaði og fíggjaði eitt hernaðarligt deyðslið, sum beindi fyri fleiri fólkum í 1991 og 1992. Í einum føri beindi deyðsliðið fyri 15 fólkum, sum vóru í veitslu í einum arbeiðarabýlingi, og í einum øðrum føri myrdi deyðsliðið níggju studentar og lærara teirra. Jose Luis Lecaros, dómari, sigur, at morðini gera tað møguligt at ákæra fyrrverandi forsetan fyri brotsverk ímóti mannaættini.

Alberto Fujimori flýddi úr Peru til Japan í 2000. Hann hevur japanskan ríkisborgararætt, og higartil hevur stjórnin í Tokyo sýtt fyri at útflýggja hann, so hann kann koma fyri rættin í Peru.

## 20.000 heimleys

ST-hjálparfelagsskapurin UNRWA, hvørs uppgáva er at hjálpa palestinum í Miðeystri, hevur ilt við at endurbyggja tað, sum er oyðilagt, síðani palestinski uppreisturin ímóti ísraelsmonnum byrjaði fyri skjótt trimum árum síðani.

Danin Peter Hansen, sum er stjóri í UNRWA, sigur, at umleið 20.000 palestinar eru vorðnir heimleysir, síðani ófriðurin kyknaði. Tey flestu hava mist húsini í ísraelskum álopum. Higartil hevur felagsskapurin bygt 158 smá hús til tey heimleysu, og 160 onnur eru í gerð. Ætlanir eru um at byggja 471 afturat, sigur Peter Hansen.

Ein uppgáva hjá UNRWA er at tryggja skúlagongd í teimum palestinsku økjunum á Vestara Áarbakka og í Gaza-geiranum, men eisini á hesum økinum hevur ófriðurin havt stóra ávirkan. Peter Hansen sigur, at úrslitini hjá næmingunum eru sjónliga versnað tey bæði seinastu árini, og hann stúrir fyri, at nógvir palestinskir ungdómar fara at detta niður ímillum í einum samfelag, sum er illa fyri frammanundan.

## Grunnur ímóti hungri

Forsetin í Brasil, Luiz Inacio Lula da Silva, hevur gjørt bardagan ímóti hungri til sítt fremsta politiska mál.

Í juni skal hann taka lut á fundinum hjá teimum ríkastu londunum í heiminum, tá tann sonevndi G-8 bólkurin fer at halda fund. Hetta er fyrstu ferð, at eitt umboð fyri eitt menningarland er boðið á fund í bólkinum, og Lula hevur longu boðað frá, at hann ætlar sær at nýta hetta høvi til at skjóta upp at stovna ein grunn, sum skal virka ímóti hungri í teimum fátæku londunum.

Lula vísir á, at tann stóra skuldin er tann stóri trupulleikin hjá teimum fátæku londunum, og nú mælir hann Heimsbankanum og Altjóða Gjaldoyragrunninum til at umskipa skuldina. Eftir uppskotinum skal helmingurin av rentunum umskipast til virðisbrøv, sum tey ríku londini skulu keypa, og hesir pengarnir skulu so í ein grunn, sum skal virka ímóti hungri. Harumframt skal vápnaídnaðurin rinda pengar í grunnin. Lula vísir á, at varð hendan skipan galdandi fyri brasilsku uttanlandsskuldina, hevði tað givið hungursgrunninum millum 15 og 20 milliardir krónur um árið.

## Njósnast dúgliga

Týska trygdartænastan, Verfassungsschutz, vil vera við, at Kina rekur umfatandi og ólógligt njósnaravirksemi í Týsklandi.

Í einari frágreiðing hjá trygdartænastuni stendur, at kinesiskir deplomatar á sendistovuni í Berlin og á konsulátunum í býunum Múnchen, Hamburg og Bonn fáast við njósning.

Men tað eru ikki bara kinesarar, sum njósnast í Týsklandi. Trygdartænastan sigur, at Norðurkorea stendur einki aftanfyri grannalandið. Norðurkoreanska sendistovan í Berlin hevur fleiri njósnarar, sum njósnast í Týsklandi, Belgia, Luksenburg, Kekkia og Slovakia, sigur Verfassungsschutz.